# Telefonvaktin

## Ein framtíðar tænasta til tey, ið altíð vilja vera tøk



Tænastumiðstøðin hjá Føroya Tele hevur ment eina tænastu, har vit svara fyri teg. Tað kann vera ein serstøða, ella tað kann vera ein fastur liður í tíni virkisætlan, **at tú altíð svarar.**

Tænastan kann verða sett til at galda í øllum førum ella til ein ella fleiri av fylgjandi møguleikum:

- Tá tað er bundið hjá tær
- Tá tú ikki svarar innan eina ávísa tíð
- Tá tú ert uttan fyri útbreiðsluøkið (fartelefon)

Møguligt er at velja ímillum, um vit geva eini boð víðari, ella um vit taka ímóti einum boðum.

**Soleiðis fært tú tænastuna**

Ring 809040

Tú boðar frá, hvat vit skulu siga fyri teg, um vit skulu taka ímóti boðum, ella geva eini boð til teirra, sum ringja.

**Hvat kostar tænastan?**

Tá tænastan er virkin og Tænastumiðstøðin svarar fyri teg, kostar hon tað sama sum nummarkall, t.v.s. 3,50 í uppringingargjaldi og 3,50 kr./min. kl. 8-18 gerandisdagar og 7,00 kr./min. kl. 18-8 gerandisdagar og allan sólarringin sunnudagar. Tann, sum hevur telefonvaktina, rindar fyri tænastuna.

FØROYA TELE

Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo


Almanna- og Heilsumálastýrið

## Kervisfyrisitari til Almannastovuna

Almannastovuni tørvar ein dugnaliga kervisfyrisitara til setan sum skjótast eftir nærri avtalu.

Kervisfyrisitarin skal vera við til at umsita kervið á Almannastovuni á teimum deildum, sum eru knýttar at Almannastovuni.

**Arbeiðið kemur millum annað at umfata:**

- Installatión og rakstur av kervinum og umsita onnur forrit á stovninum.
- Ábyrgd av tí dagligu driftini og trygdini á edv-umráðinum
- Viðlíkahald og uppdatering av hardware og software.
- Ráðgeva og hjálpa brúkarum á stovninum.

**Førleikakrøv:**

At tú:

- hevur royndir ella/og útbúgving innan IT
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert erliur og opin
- kann arbeiða undir trýsti
- hevur lætt við at seta teg inn í nýggjar uppgávur

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jaspur Langgaard, EDV leiðara, tlf. 315480.

**Umsóknarfreist:** 22. februar 2000, kl. 14

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum, CV o.ø. skal sendast til:
**Almanna- og Heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

## NORÐURLANDAHÚSIÐ

## Avloysarar søkjast

Søkt verður eftir avloysarum. Ein til ljósarbeiðið og ein til ljóðarbeiðið at byrja 15. februar 2000.

Starvstíðin verður til 1. september 2000.

Umsóknir verða at senda til:

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Postboks 1260**
**110 Tórshavn**

**Att.: Zacharias Guttesen, árbyrgdarljósmann**

**Att.: Óla Jákup í Dímun, ábyrgdarljóðmann**

Freistin at søkja er 12. februar 2000.

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Ford Escort CLX 1,8 Diesel, 4 hurðar

**Árg.:** 25.10.1994

**KM:** 144.617

Bilurin verður seldur, sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvági.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 37 38 90 • fax nr. 37 31 17
hittist best millum kl. 08.00-10.00


## DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**


## Bilur við skaða til sølu til hægstbjóðandi

**Merki:** Ford Fiesta Sport 1,3 bensin - 3 hurðar.

**Árg.:** 16.06.1995

**KM:** 76.474

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú, og kann síggjast á bilverkstaðnum hjá Mogens Petersen, 826 Trongisvágur.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 37 38 90
fax nr. 37 31 17
at hitta millum kl. 08.00-10.00



## Suðurstreymoyar Útróðrarfelag

Aðalfundur Suðurstreymoyar Útróðrarfelags verður á sjómansheiminum í Havn tann 20. februar kl. 14.00.

**Nevndin**

## Aðalfundur

### Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins

verður **leygardagin 26. februar kl. 13.00 í Havnar Klubba.**

**Skrá:**

1. Frásøgn formansins frá farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar.
3. Virkisskrá.
4. Lógarbroytingar.
5. Møgulig uppskot frá limum og nevnd.
6. Ásetan av limagjøldum.
7. Val av formanni.
8. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
9. Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi.
10. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygadagin 19. februar 2000.**

Uppskot til formann felagsins er:

**Gunnleivur Dalsgarð**
**Varðabú 32**
**100 Tórshavn**

**Starvsmannafelagið**

## Aðalfundur

### Eftirlønargrunnur Starvsmannafelagsins

hevur aðalfund beint eftir aðalfund Starvsmannafelagsins í Havnar Klubba 26. februar.

**Skrá:**

1. Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Val av nevndarlimum
4. Ymiskt.

**Nevndin**

## Landssjúkrahúsið

**FO-100 Tórshavn**

## 1. assistentur til B8

Eitt starv sum 1. assistentur til B8 coronardeildina er leyst til setan 1. mars 2000 ella skjótast gjørligt aftaná.

Høvuðsábyrgdarøki hjá 1. ass. yvirfyri deildarleiðaranum er dagføring og ábyrgd av tilfari við tilknýti til coronardeildina, ábyrgd av upplæring hjá nýggjum fólkum á deildini, luttaka í vanl. arb. á deildini.

Arbeiðstíðin er dagvakt yrkadagar, tó náttarvakt 3. hvørt vikuskifti.

**Viðkomandi, sum settur verður skal hava:**

- Innlit í røkt av sjúklingum við coronarsjúkur.
- Duga at arbeiða málrættað.
- Hava góð samstarvsevni.

Løn- og setanartreytir samb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið, við at venda sær til Annemi Joensen, deildarsjúkrasystir á telefon 313540 lokal 108.

Umsóknarfreist er 23.02.2000, kl. 14.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum verður at senda til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**

## Dagstovnurin Mýrifípan

Vit søkja eftir hjálparfólki skjótast tilber til stovu við 20 børnum 3-7 ár 30 tímar um vikuna fram til 30/6-2000.

Løn samb. sáttmála við Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvi og viðmæli verða at senda til stovnin áðrenn 17. feb.

**Dagstovnurin Mýrifípan**
**820 Trongisvágur**
**Tel. 372700**

## Ársaðalfundur

Lýst verður til ársaðalfund í arbeiðsfelagnum Fylking mánadagin 28. februar kl. 19.00. Skrá samb. lógum felagsins.

Til umrøðu møgulig umbygging av hølum felagsins.

**Nevndin**

## Grundskeið í boring

**Tíðarskeið: 6. mars – 17. mai 2000**

Grundskeið í boring er eitt ástøðiligt (teoretiskt) skeið innan boritøkni. Skeiðið gevur ikki ein endaligan førleika at arbeiða innan borivirksemi, men gevur eina ástøðiliga upplæring, ið saman við verkligari upplæring í teimum einstøku fyritøkunum gevur førleika til ymisk arbeiði sum t.d.

- tornarbeiði
- boridekksarbeiði

Skeiðið er ein fyrsta innføring í ymiskt boritekniskt arbeiði, og tað er sostatt eitt fyrsta stig á vegnum hjá teimum, sum ynskja at sleppa at arbeiða á hesum øki.

Skeiðið verður hildið í samstarvi við Stavanger maritime videregående skole, ið eisini stílar fyri skrivligu próvtøkuni. Skeiðið verður sostatt eisini góðtikið sum førleikagevandi av OLF (Olieindustriens Landsforening i Norge).

Skeiðsgjaldið er 10.000 kr, og fevnir tað um undirvísing, undirvísingartilfar, eina viku námsferð til Stavanger, har vitjað verður hjá ymiskum fyritøkum v.m. og eitt 5 daga trygdarskeið. Lokið trygdarskeið er ein fyritreyt fyri at arbeiða í frálandavinnuni.

Ein fyritreyt fyri at innskriva seg til skeiðið er, at tú í minsta lagi hevur lokið SIT-útbúgving ella hevur samsvarandi kunnleikastøði. Viðkomandi verkligar royndir kunnu síðustillast við SIT-útbúgving.

Skeiðið verður hildið á Tekniska Skúlanum í Tórshavn.

Seinasta freist at innskriva seg til skeiðið er 24. feburar, og faldari um »Grundskeið í boring« og innskrivingarblað fáast við at venda sær til ein av stovnunum, sum eru limir í Oljuútbúgvingarsamtakinum.

Meiri um skeiðið fæst at vita við at vitja heimasíðuna hjá Maskinmeistaraskúlanum (www.mec.fo) ella hjá einum av hinum skúlunum, ella við at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Falkavegur 6, Tórshavn, tlf. 355050.

Tórshavn 28. januar 2000

**Oljuútbúgvingarsamtakið**

Oljuútbúgvingarsamtakið, ið er eitt samtak millum Tekniska Skúlan í Tórshavn, Tekniska Skúlan í Klaksvík, Maskinmeistaraskúlan, Føroya Sjómansskúla og Undirvísingar- og Mentamálastýrið, skipar fyri einum 7 vikur grundskeiði í boring í døgunum 6. mars – 17. mai 2000. Skeiðið endar við próvtøku.


## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16